HEILSANIR

Góða didda!
Nú ert tú blivin stór, hetta er langt síðani – hjartaliga tillukku tann 1.
xxx mamma

Góða Karin
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum.
Heilsan mamma og pápi

Í morgin fyllir hesin góði maðurin. Hjartaliga tillukku verður ynskt frá góðum vinfólkum.
Vinir

Góðu Thordis og Tróndur
Hjartaliga tillukku við 4 og 2 ára døgunum. Alt tað besta í framtíðini. Jesus pápi signi tykkum.
Ynskja mamma, babba og Torkil

Jón í Homrum
Hjartaliga tillukku við degnum í morgin. Nær kemur tú úr grulvigarðinum?
Grannarnir

Góðu tit bæði
Lukku og gleði á tykkara føðingardegi 4. og 5. feb.
Ynskja omma, abbi, mostir og gubbi

Góðu tit bæði
Hjartaliga tillukku á gullbrúdleypsdegnum í dag.
Ynskja vit øll í Homrum

Hey tit allar
Góða Maiken hjartaliga tillukku við føðingardegnum 28. jan. Alt tað besta ynski eg tær og tykkum øllum.
Heilsan úr Árnafirði

Góði Jóhan Petur
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum. Vónandi verða tað nógvir fiskitúrar við Eysturbúgvanum.
Heilsan abbi, omma og Gunn

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin 9.12.00 ógloymandi, takk til tykkum, ið møttu so fjølment og vaktu okkum við tí vakra morgunsangi og til tykkum mongu, sum gjørdu okkum kvøldið í Roynhøllini so ógloymandi. Takk øll, ið mintust okkum við telegrammum, blómum, telefonsamrøðum, gávum og annars øll tit, ið hjálptu til fyri at gera dagin so hugnaligan fyri okkum. Við ynskjum um eitt gott nýggjár.
Heilsan Hilda og Allan Næs, Hvalba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

TILTØK

FØÐINGAR

21. jan. fingu Lív Hovgaard og Jóhann í Dali, Lyngby, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

23. jan. fingu Anja Joensen, Vágur og Jan Haldansen, Vestmanna, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4250 gr.

24. jan. fingu Maibritt og Martin Sivertsen, Norðdepli, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

24. jan. fingu Marna Hansen og Jóhann Pól Christiansen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

25. jan. fingu Lene LeMcire Rendeman og Claus Hassing Rendeman, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3300 gr.

26. jan. fingu Anita og Bent Mortensen, Vodskov, tvíburðar, gentu og drong. Gentan var 49 cm. long og vigaði 2440 gr. og drongurin var 51 cm. langur og vigaði 3140 gr.

26. jan. fingu Guðri og Tummas Láadal, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

27. jan. fingu Borgny Jacobsen og Andrias Petersen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4300 gr.

27. jan. fingu Súsanna og Kristin Rasmussen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2520 gr.

27. jan. fingu Rannvá Dam og Steen Hjaltalin Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.

28. januar fingu Elin Michelsen, Tórshavn og Símun Eliasen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

28. januar fingu Turid Johannesen og Sámal Hansen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

29. jan. fingu Sonja Arge og John Johansen, Tórshavn tvíburðar – dreingir. Annar drongurin var 48 cm. langur og vigaði 2465 gr. hin var 50 cm. langur og vigaði 3120 gr.

31. jan. fingu Katrina Johannesen og Esbern í Eyðanstovu, Mykines, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

1. feb. fingu Eyðvør og Jógvan Arni Petersen, Sørvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

ANDLÁT

23. januar:
Mary Davies, Nottingham, fødd Højgaard í Saltangará, 73 ár.

24. januar:
Sverri Egholm, Tórshavn, 70 ár.

25. januar:
Óli, lítli sondur Randi og Jákup Biskupstø, 1 ár.

27. januar:
Friðbjørg Jacobsen, 60 ár.
Else Weihe Joensen, í Vági, 86 ár.

28. januar:
Maud Vestergaarrd, fødd Johannesen, ættað av Selatrað, búsitandi í Hillerød, 47 ár.

29. januar:
Súsanna Hentze, í Skúvoy, 85 ár.

31. januar:
Elken Jensen, á Sandi, 82 ár
Júst Joensen, í Sørvági, ættaður úr Mykinesi, 70 ár.

Gudstænastur
5. sunnud. eftir trettanda
Sørvágur: kl. 12, David Johannesen
Kirkju: kl. 12, altarg., *Hattarvík:* kl. 17, altarg., Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11, altarg., Heri Joensen
Norðskála: kl. 12, Meinhard Bjartalíð
Rituvík: kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
Hvalvík: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Vestmanna: kl. 12, Inga P. Dam
Christianskirkjan: kl. 11, (útvarpað) Hans Eiler Hammer. (Bønarmøti verður kl. 10.30 í kjallaranum)
Havnar kirkja: kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40 Sverri Steinhólm og Peter O. K. Olofson
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein. (Talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið).
Vágur: kl. 11, Erland Beder
Skála: kl. 11, *Sjóvar kirkja:* kl. 12.10 Jógvan Friðriksson (Talvan gongur fyri Heimamissiónina)
Hvalba: Ólavur Rasmussen
Tvøroyri: Petur M. Rasmussen
Skopun: kl. 12, Eva Brinck Jensen

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Mike Fitzgerald talar, kl. 18 kvøldmøti Per Eivind Stig talar. Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, Guttorm Zachariasen sigur frá.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið Húsagøta 1
Missiónsvikan í Meinigheitshúsinum, Húsagøta 1. Í kvøld kl. 20 møti, talari: Niels Jacob Nielsen, sangur: Petur Hans Hansen og Tummas Dam, innsavnan til Ytrimissións arbeiðið. Bókaborð og drekka verður aftaná møti.
Familjumøti verður sunnudagin kl. 14. Manskórið og Gentukórið luttaka við sangi, eisini verður drekkamunnur at fáa. Innsavnan verður fyri sunnudagsskúlan í Meinigheitshúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Jóan Peter Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Jóna og Miu Johannesen, á Frælsinum 24. Øll eru vælkomin.

»Tíð til Gud«
verður í Pállstovu í Havn sunnukvøldið kl. 21. Hesuferð verður fríður vitnisburður. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti har børnini eisini taka lut.
Mánakvøldið kl. 20.30 Ungu hjúnini savnast hjá Monu og Sverra, Fjalsgøta 7.

Missiónshúsið á Argjum
Missiónsvikan í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum frá 5. til 11. feb.
Mánadagin kl. 20 møti, talari: Sverri Steinhólm, sangur: Teir fýra luttaka.
Týsdagin kl. 20 møti, talari: Niels Jacob Nielsen, sangur: Meinigheitskórið.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 evangel. møti. Mánadagin kl. 20.30 bønarmøti.

Konfirmatión
í eystara parti av Norðstreymoyar prestagjaldi verður í Hvalvíkar kirkju pálmasunnudag 08. apríl kl. 11. Farið verður at ganga til í Hvalvíkar missiónshúsi týsmorgunin 27. mars kl. 08. Í hesum sambandi eru bæði komandi konfirmantar sum foreldur/avvarðandi teirra vælkomin til ein drekkamunn í Hvalvíkar missiónshúsi týskvøldið 06. febrar kl. 20.30.

Missiónshúsið í Leirvík
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Ásbjørn Jacobsen, húsakórið syngur. Øllið hava hug at syngja við húsakórinum verða biðin um at møta kl. 17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Filadelfia, Sundalagi
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 í Kelduni v/ Pola Jacobsen.

Lívsins Orð
Í dag kl. 17.30 barnamøti og kl. 20.30 opið hús.
Sunnudagin kl. 10.30 møti við Dávid Bech og kl. 19 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 19 undirvísing. Týskvøldið kl. 20 møti fyri kvinnur.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Hjalgrim Davidsen. Lovsongsbólkur luttekur. Aftaná verður kaffi og samvera, tey ungu skipa fyri.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17 møti við Malmberg Olsen.
Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

Elim, Søldarfjørður
Hugnaløta fyri ung og eldri verður í kvøld kl. 21. Sangur við Anju, tala við Joen Magnus og tónleikur við Jóannes, Hallgrím og fleiri. Drekka verður aftaná.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti. Øll eru vælkomin.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við David Bech.
Húsmøti verður hjá Jonnu og Palla Højgård týsdagin kl. 19. Verið øll hjartaliga vælkomin.

Bíbliuskeiðrøðin
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

Bahá'i á Toftum
Bahá'i samkoman á Toftum skipar mánakvøldið 5. feb. fyri bønarfundi frá kl. 20 til 21 heima hjá Jens og Elibel von Krogh. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti, Elin greiðir frá Ísraelstúrinum.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 3. feb.: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnud. 4. feb.: Andreas Petersen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

BRÚDLEYP

10. mars giftast í Havn, Jóhann Simonsen úr Norðradali og Óluva Maria Bech úr Havn. Veitslan verður hildin í HB-húsinum og tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 313804, 315454 innan 20. februar.

GULLBRÚDLEYP

Í dag 3. feb. kunnu hjúnini Helena og Kristoffur Dragaberg, Klaksvík halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.